# Deyðasjúk ongan góðan

**Hetta er 2. partur í greinarøðini, har Sosialurin viðger umstøðurnar hjá deyðasjúkum og varðandi sjúkum í Føroyum. Sum støðan er í løtuni, er tað ongin innan almanna- og heilsuverkið, sum burturav tekur sær teimum, ið eru uppgivin av læknum og bert bíða eftir deyðanum. Við øðrum orðum hava tey deyðasjúku ongan góðan í heilsuskipanini**

Anna Maria Joensen, sum hevur skrivað hesa greinarøðina um viðurskiftini hjá deyðasjúkum, er 45 ár og ættað úr Havn. Í 1991 flutti hon til Danmarkar í lestrarørindum og kom heimaftur fyri sløkum tveimum árum síðani saman við manni og dóttur. Er útbúgvin innan útflutning í Herning og hevur starvast í bæði fiskivinnu og oljuvinnu. Seinni lisið norðurlendskar bókmentir og mentan á Lærda Háskúlaunum í Helsinki, har familjan búði í sløk fimm ár. Komin aftur til Danmarkar læs hon bókmentafrøði sum høvuðsgrein og minnilutabólkar sum síðugrein á Lærda Háskúlanum í Keypmannahavn. Anna Maria Joensen, ið sjálv hevur royndir sum avvarðandi, sigur, at endamálið við greinarøðini er breiða út vitan og kunnleika um støðu teirra deyðasjúku, varandi sjúku og teirra avvarðandi. Samstundis at vísa á, hvat aðalmálið í norðurlondum um heildarhugsan, heildarviðgerð og umsorgan miðar eftir. Palliativur (linnandi, men ikki lekjandi) hugburður og umsorgan, sum hevur ment seg innan krabbameinsøkið burturav, er tað besta heilsuverkið kann bjóða varandi sjúkum. Henda sokallaða holistiska (heildarspekiliga) tilgongdin setir



menniskjað sjálvt í miðdepilin og átti at verðið framd í verki fyri øll varandi sjúk í Føroyum, heldur Anna Maria Joensen.

**Miðlahúsið viðger umstøður hjá deyðasjúkum**

Týskvøldið 10. apríl kl. 19 verður pallborðsfundur í Miðlahúsinum um umstøður teirra deyðasjúku og varandi sjúku í Føroyum. Øll eru vælkomin at líða á og seta spurningar til luttakararnar við pallborðið, sum millum annað verða umboð fyri heilsuverkið, sjúklingafeløg og politisku skipanina.

# Onki pláss til doyggjandi

**Sjúklingaráðsformaður kundi hugsa sær, at palliativa toymið á Landssjúkrahúsinum og Nærverkið við heimarøktini arbeiddu saman til tess at veita krabbameinssjúklingum størri tryggleika og valmøguleikar**

DEYÐASJÚK
*Anna Maria Joensen*
*amac@post.olivant.fo*

- Fyrr var krabbamein oftani ein deyðilig sjúka, ið var tengd at stórari angist og stúran hjá teimum, sum fingu sjúkuna. Soleiðis er ikki longur. Men hóast gransking innan medisin og aðra viðgerð hevur tálmað fylgjunum av krabba, eru tað eisini krabbasjúklingar, ið eru eru varandi sjúkir og at enda doyggjandi. Serliga hesin parturin tørvar eina samanhangandi umsorgan við serkunnleika til seg og familjuna, nakað sum er nærum ógjørligt at veita í einum effektiviseraðum sjúkrahúsverki, sigur Jákup N. Olsen, sjúklingaráðsformaður.

Palliativa toymið ið Landssjúkrahúsið hevur í dag, líkist ikki heilt tí, sum tilmælið nevnir, har toymið skal røkka út í nærverkið. Hvat heldur tú um tað?

- Tað er spell. Møguliga liggur nakað av trupulleikanum í, at sjúkrahúsleiðslan fokuserar uppá kurativa viðgerð – har ein verður frískur – og júst umsorgan og røkt hoyrur undir sjúkrarøktarfrøðina burturav. Sjúklingaráðið er ráðgevandi eind hjá landsstýrismanninum í almanna- og heilsumálum og kann bert tilmæla loysnir, men krevja nakað. Vit hava strongt á at fáa eitt palliativt toymi, og tað er sera torført at fáa nýtt virksemi inn á fíggjarlógina. Annars er ein bólkur settur at gera tilmæli til krabbameinsheildarætlan, og vit fara framyvir at arbeiða fyri hospice hugburðinum, sigur formaðurin í Sjúklingaráðnum.

Tað at hava ávirkan og stýring av sínum egna lívi er sera umráðandi í støðuni,



*- Tað er umráðandi fyri deyðasjúk og avvarðandi at sleppa at velja, hvussu tann seinasta tíðin skal forma seg, sigur Jákup N. Olsen, sjúklingarráðsformaður og nevndarformaður í Føroya Felag móti Krabbameini*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

tá kroppurin gerst sjúkur, og vit ikki longur hava kontrol á tí partinum av lívi okkara. Tí er umráðandi at fáa persónliga sjúkuviðgerð, so ein sjúklingur ikki gerst verri fyri og kanska alt ov tíðliga verður settur til viks á arbeiðsmarknaðinum og sosialt í samfelagnum.

- Persónligt tillagað viðgerð ger teg minni sjúkan. Tað er umráðandi at fáa tillagaða viðgerð, so ein kann røkja dagligdagin við arbeiði, familju og peningaviðurskiftum. Bara tað at kunna tilrættisleggja, nær kemoviðgerð fer fram, kann geva økt arbeiðsføri. Fært tú kemoterapi ein fríggjadag til dømis, so kanst tú fara til arbeiðis mánadag, um alt veit væl við. Sum sjúklingur kemur tú nógv skjótari gjøgnum skipanina, og hetta sparir eisini samfelagnum pening í síðsta enda.

Men fyri nógv kemur ein dagur, har tey ikki longur kunnu standa ímóti, og sjúkan antin kemur aftur ella fer at gera um seg av álvara. Tá er tað kanska enn meira átroðkandi at kunna kenna, at ein valmøguleiki er. At kunnu taka avgerðina sjálvur, hvar tú vil doyggja, sigur Jákup N. Olsen.

## Nógv hjáárin

Sjúklingaformaðurin greiðir frá, at tað er avgerandi hjá krabbameinssjúklingum at sleppa at velja, hvar ein ynskir at doyggja ella bara vera undir sjúkraleguni.

- Soleiðis sum eg síggi tað í dag, er tað umráðandi fyri krabbameinssjúklingar at sleppa at velja at vera í heiminum ella á sjúkrahúsi. Hetta ber illa til í Føroyum í dag. Men eitt nú í Danmark kunnu sjúklingar velja sjálvir, sigur Jákup N. Olsen.

Ofta hevur verið frammi, at krabbameinssjúklingar kunnu hava nógva pínu síðstu tíðina, tí svullir gera fortreð, oyðileggja gøgn og annað. Eisini kann sjálv viðgerðin við kemoterapi ella heilivági geva nógv hjáárin. Hesi hjáárin kunnu hjálpast við serligum heilivági og øðrum linnandi terapisløgum. Tí er ikki líkamikið um røktarstarvsfólk hava serútbúgving á hesum økinum.

- Røktarfólkini sjálv skulu eisini hava frálæru og styrk fyri at læra at verja seg undir so stórum trýsti, sum tað kann vera at røkta eitt doyggjandi menniskja og tosa við tey avvarandi. Hetta kallast supervisión og er so smátt við at koma til Føroyar.

Víðari sigur Jákup N.

Palliativ umsorgan – og ella holistisk umsorgan – er ein heildarumsorgan, ið tekur støði í altjóða WHO-viðtøkum:
- ásannar lívið og sær deyðan sum eina natúrliga prosess
- hvørki framskundar ella útsetir deyðan
- linnar um pínu og onnur sjúkueyðkenni
- integrerar umsorganinna fyri sálarligu og andaligu økjunum
- bjóðar sjúklingum stuðul at liva virkin, sum umstøðurnar nú loyva, fram til deyðan
- bjóðar familjuni stuðul undir sjúkraleguni og aftaná í samband við sorgina

Kelda: Tilmæli um hospice funktión 2001